# Bróta múrar niður



Høgni Hoydal er landsstýrismaður í nýstovnaða uttanríkismálaráðnum

**Í einum landi, sum ikki er sjálvstøðugt, er eitt uttanríkismálaráð eitt ráð, sum liggur millum skins og hold, sigur Høgni Hoydal, uttanríkismálaráðharri**

NÝTT LANDSSTÝRI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Tað er ein andsøgn í sjálvum sær, at hava eitt uttanríkismálaráð, tí tað eru danir, sum umsita uttanríkismál fyri okkum. Men skulu vit koma víðari á sjálvbjargnisleið, mugu vit finna út av hvat ber til, og hvat ikki ber til.

Tað sigur nýggi uttanríkismálaráðharrin, Høgni Hoydal.

Hansara fremsta uppgáva verður at bróta niður teir múrar, sum forða á sjálvbjargnisleið.

Sum er umsita danir uttanríkismál fyri okkum, men tað sær Høgni Hoydal ikki sum nakran stóran trupulleika.

- Tað verður eingin trupulleiki at fara út saman við dønum at viðgera uttanríkismál, sum viðkoma Føroyum. Vit skulu bara gera semjur um málini í Føroyum, og so fara út at fremja tær, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur, at hann í uttanríkismálum fer at verða føroyska andlitið úttattil, men at løgmaður í almennum høpi framvegis verður føroyska andlitið mótvegis útheiminum.

Men føroyingar skulu nú í størri mun halda eyga við og hava eina støðu til tað, sum hendir úti í stóru verð.

- Hetta má alt gerast í samstarvi við Danmark, men tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki uttan í málum, har Danmark fer ein veg og Føroyar ein annan. Tá verður neyðugt at arbeiða fyri, at hin føroyska røddin verður tann avgerandi, sigur Høgni Hoydal.

Nýggi uttanríkismálaráðharrin heldur, at júst tað, at vit upprætta eitt uttanríkismálaráð sendir eitt greitt signal út um, at vt ynskja at standa á egnum beinum.

- Og hartil er tíðin eisini farin frá innibyrging, sigur Høgni Hoydal.

---

# Eingin skal kenna seg avkrøktan

**Tað sigur nýggja landsstýriskvinnan í løgmálaráðnum, Helena Dam á Neystabø, sum ætlar sær at leggja stóran dent á umhvørvið**

NÝTT LANDSSTÝRI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Helena Dam á Neystabø hevur verið í lótum fyrr. Hon sat sum landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum frá 1998 til 2001*

Tað er ikki nýtt fyri Helenu Dam á Neystabø at sita í landsstýrinum. Og tað kann vera ein av orsøkunum til, at tað júst gjørdist hon, sum fekk heiðurin av at umsita lógarmál.

- Eg eri ógvuliga fegin um, at tingbólkurin peikaði á meg og vístu mær hetta álitið. Tað hevur møguliga talt við, at eg havi nakað av politiskum royndum frá stórum og drúgvum málum. Eg havi sitið í landsstýrinum fyrr, og havi verið við í stórum verkætlanum, sum eitt nú bankakanningini á sinni, har eg var inni í allari møguligigari løgfrøði, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon heldur, at tað møguliga eisini hevu talt við, at tað skuldi verða ein kvinna, men at tað altíð eru so nógvar telvingar, tá ein landsstýrissessur skal mannast, at eingin er sjálvskrivaður.

Nýggi løgmálaráðharrin fegnast annars um, at tað nú eru fleiri kvinnur, sum mana landsstýrið.

- Eg havi roynt at verið einsamøll kvinna í landsstýrinum, og tað var ikki altíð so lætt, sigur Helena Dam á Neystabø.

At tað so júst gjørdist løgmálaráðið, sum hon fekk at umsita, var bara ein partur av telvingini.

- Javnaðarflokkurin legði stóran dent á at varðveita løgmann, og vit løgdu somuleiðis stóran dent á at halda fram í almanna- og heilsumálaráðnum. Men starvið sum løgmálaráðharri er jú sera spennandi. Tað er eisini ein spurningur um, hvussu vit varðveita og menna Føroyar, sigur Helena Dam á Neystabø.

Løgmálaráðið er avleitt av fyrrverandi Innlendismálaráðnum, og umsitur mest sum somu málsøki, harundir eisini umhvørvið. Og hetta ætlar Helena Dam á Neystabø ikki skal gerast eitt forsømt mál.

- Eg fari fyrst og fremst at seta meg væl inn í umhvørvisliga økið, men eg fari heilt víst at arbeiða fyri, at Føroyar verða viðurkendar innan hetta økið, sigur Helena Dam á Neystabø sum undirstrikar, at hon er landsstýriskvinna fyri alt landið, og at eingin krókur í landinum skal kenna seg avkrøkt.